# Alskyns kunning um olju í Nóatúni

*Hesa vikuna hevur nýfoundlendarin Mark Shrimpton kunnað føroyingar um ymisk viðurskifti, ið viðvíkja oljuvinnuni. Um 30 fólk hava verið á skeiði fyri at nøra um vitan sína*



Eitt evni, ið upptekur nógvar føroyingar í hesum døgum, og sum má sigast at vera eitt rættuliga spennandi evni, er olja undir Føroyum.

Olja undir Føroyum – um hon altso veruliga *er* undir Føroyum...

Hesa vikuna hevur ein nýfoundlendari verið í Føroyum og havt skeið fyri fólki, ið hevur áhuga fyri at vita meira um olju og oljuvinnu og annað í tí sambandi.

Skeiðið hevur verið á deildini hjá Fróðskaparsetrinum í Nóatúni í Havn, og hava um 30 fólk verið á skeiðinum.

Fyrrapartarnir eru fyri tað mesta farnir við, at Mark Shrimpton hevur havt orðið, men so hevur verið tosað meira breitt seinnapartarnar og hevur eisini verið arbeitt í bólkum.

## Innleiðandi skeið

Fyrstu tríggir dagarnir vóru líkasum eitt innleiðandi skeið, og har nart Mark Shrimpton við fleiri grundleggjandi evni, so sum jarðfrøðina, umsiting, peningaspurningar í sambandi við oljuvinnuna og annað.

Fjórða og fimta dagin er meira gjørt burturúr at viðgera einstøk evni, ið hava við hesi viðurskifti at gera, so sum avleiðingarnar fyri vinnuna, avleiðingar á landi og so framvegis.



*Eini 30 fólk (niðara myndin) hava í vikuni verið á oljuskeiði við nýfoundlendaranum Mark Shrimpton (ovara myndin).* Mynd Kalmar

Alt hetta kann hann lýsa út frá drúgvu royndunum hjá nýfoundlendarum við víkjandi oljuvinnuni, og eisini er tað fyrimunur, at Føroyar og Nýfoundland ikki eru ólík – talan er um oyggjasamfeløg, ið hava nógv til felags, so sum arbeiðsloysi, eina fiskivinnu, ið ikki ber seg, og annað, sigur Jógvan Mørköre á Fróðskaparsetri Føroya, ið hevur havt við oljuskeiðið at gera.

## Gera møguliga meira burturúr

Sjálvandi ger tað eisini seg galdandi, at teir eru nakað væl størri enn vit, men stórt sæð er nógv felags at ganga útfrá.

Nú skeiðið er av, skal so eisini finnast útav, um meira skal verða gjørt burturúr, og um kanska enn meira skeiðvirksemi skal koma inn í myndina.

Annars var Mark Shrimpton í Føroyum fyri hálvum øðrum ári síðani, so hann kann valla sigast at vera ókendur við føroysk viðurskifti.

At hann so eisini hevur eitt ráðgevandi felag, ið eitt nú tekur sær av at skipa fyri ráðstevnum, skeiðum og líknandi, kann kanska eisini koma føroyska lívinum til góða, verður meira gjørt burtur úr skeiðvirksemi, ið viðvíkur oljuvinnu.

hj.

# Líkningarráð Føroya kravt Global-skatt inn ólógliga

Týsdagin fall dómur í einum áhugaverdum og rættuliga prinsippiellum sakarmáli í Føroya Rætti.

Ein av teimum, sum fyrst í 80-árunum settu pening í byggingina av Global-skipum hevði stevnt skattadeildini hjá Føroya Landsstýri eftir 23.660 krónum, ið kravdar vórðu inn í skatti frá honum í 1991.

Talan var um skatt, ið líkningarvaldið helt seg hava rætt at krevja inn, eftir at sakarmálið frá 1987, ið Føroya Gjaldstova hevði lagt móti trimum høvuðsluttakarum í Pf. Global Chemical Tankers – Alberti Mortensen, Mariusi Garðshorn og Sverra Joensen – var endað í semju.

Hendan semja gekk millum annað út uppá, at eitt lán frá týsku skipasmiðjuni Busumer Werft, ið bygdi skipini, skuldi roknast sum skattskyldug inntøka.

Semjan varð tí tikin so bókstaviliga av skattavaldinum, at eisini hinir partaeigararnir, ið áttu í Global-skipunum, skuldu gjalda skatt, samsvarandi teirra part í hesum góða láni.

Hvussu nógvar mans, tal an er um, hevur ikki eydnast Tíðindablaðnum Sosialinum at fáa uppspurt heilt nágreiniliga, men tað skilst, at talið liggur nærhendis teimum hundrað.

Ein av hesum fekk 1. mars 1991 bræv frá Líkningarráð Føroya, har tað boðaði frá, at tað vísandi til rættarsemjuna nevnda sakarmáli hevði gjørt av at hækka skattskyldugu inntøkuna hjá viðkomandi persóni fyri 1981 *(tað árið, tá lánið varð tikið, blóm.)* við 40.000 kr – svarandi til part hansara í láninum frá skipasmiðjuni. Hálvanannan mánað seinni varð tó boðað manninum frá, at líkningin var broytt til 23.660 kr.

## Fyrnaður skattur

Hesa upphædd rindaði maðurin – tó undir mótmæli – og síðani legði hann sak móti líkningarvaldinum, ið byrjaði 24. juni 1991.

Orsøkin til sakarmálið er tann, at talan sjálvsagt er um fyrnaðan skatt – altso skuld, ið er so gomul, at hon ikki kann verða innkravd.

Dómurin fall sum sagt týsdagin, og varð Føroya Landsstýri har dømt at hava kravt tann fyri 1981 álíknaða skattin – tær 23.660 kr – inn ólógliga, av tí at hetta var fyrnaður skattur. Somuleiðis skal Føroya Landsstýrið innan 14 dagar rinda manninum 8.000 kr í sakarmálskostnaði.

Sum skilst, hava nógvir av partaeigarunum í Global stuð við spenningi og bíðað eftir, hvat hetta sakarmálið fór at enda við.

Tí kann eisini roknast við, at í kjalarvørrinum av hesum máli fylgja krøv av sama slag frá teimum um hundrað monnunum, ið hava havt somu lagnu.

Tíðindablaðið Sosialurin fylgir víðari við málinum.

hj.